# Vit eru farin niðanfrá

*Tala, hildin uppi á Skarðinum sunnudagin 6. august 2000*



Vit eru farin niðanfrá — farin niðan á Skarð, meðan flytifuglurin ger seg til reiðar at fara um høv til fremmandar strendir. Steinstólpan við driftinivel situr á kollinum á sátubørnum og erpar sær. Hetta ger hon ár um ár, tá ið kyllingar og sátubørn eru komin upp at standa. Meðan hetta er, fara vit niðan á Skarð 1. sunnudag í august — og heilsa upp á varðan uppi á Skarði, syngja og lýða á røðu. Hetta er so fimta ár á rað, at svá er.

Skuldi tú yvir á Rustina, Góðadal ella í Skarðhaga varð farið niðan á Skarð. Skarðið var portrið til henda óspilta og dragandi heim. Varðin á Skarðinum er ein tann prúðasti í landinum. Tú eigur ein part av honum. Tey vaksnu bóðu okkum kasta trýggjar steinar á varðan, meðan teskað varð: Gud fader, Guds søn, Gud den helligånd. Hevði varðin kunnað talað, hevði hann sagt tær, hvussu mangar steinar, tú hevur og onnur hava lagt afturat hesari steinarúgvu.

Farvegurin lá um Skarðið. Varðin vísti vegin. Slóðin av seyði, neytum og fólki hevur sett síni sporð her líka úr fjørukletti og niðan á Skarð. Niðri við sævarklettin er bygdin - Fuglafjørður. Hon er ein landnámsbygd. Her hava ættarlið eftir ættarlið búð, hugt niðan á Skarð, niðan á fjallarøðirnar og hava verið pílagrímar í hesum tíðarhavi. Í 1000 ár hava vit verið kristi fólk og hava vit gjørt sum Dávid kongur hugt upp ímóti fjallarøðunum: Eg eygu míni hevji til fjallanna upp, hvaðani kemur mín hjálp? Hjálp mín frá Harranum kemur, skapari himmals og jarðar. Dávid kongur hevur hugt upp eftir fjallasíðuni, og eygu hansara fóru longur upp í ta alstóru rúmd. Hann hevur í skaldskapi lætt ljóðið av og givið til kennar gudsótta sín.

Har uppi úr tí bláu rúmd eru slóðir, sum vit lítið fata av. Ofta er tað vatnið, sum er knýtt til symbolir í mytum frá aldargomlum frásagnum og guðamyndum, eitt kosmiskt hav, sum røkkur út ímillum stjørnurnar. Tú kanst ganga fram við Skarðsá, áðrenn tú kemur niðaná. Keldurnar til hesa á eru her uppi. Her hevur vatnið runnið í milliónir av árum. Áin, vatnið kundi eisini sagt frá, og tað ger tað eisini.

Minnið um eitt kosmiskt hav sæst enn á himmalhválvinum í stjørnumyndum t. d. Fiskurin, Hvalurin, Suðurfiskurin og Hydra (ella Vatnormurin). So er tað áin Eridanus, sum hevur keldu sína við føtur Orions og hvørvur suðuryvir við sínum stjørnuvatni. Hetta er so vakurt sagt, at tú steðgar á, og fert at hugsa. Tað gjørdi Dávid kongur, tá ið hann hugdi upp eftir fjallasíðuni og tað hava føroyingar eisini gjørt t. d. Mikkjal á Ryggi í yrkingini: Kom upp á fjallatind.

Mytirnar siga okkum nógv um líkheitina millum tíð og vatn. Tíðin er áin, sum er allastaðni, elementið sum slítir og terir . Tíðina síggja vit ikki við okkara egnum eygum, men hevur eina ímynd av einari kosmiskari á, sum rennur gjøgnum meg og teg, ber okkum burt og tínir okkum, men samtíðis er tað tíðin, sum ger at skapanin heldur á fram, tíðarinnar á sum er okkara lív og okkara týning. Kanska tí hava teir gomlu stjørnugranskarnir nýtt havið, vatnið til eina ímynd, tá ið teir hava granskað stjørnuhválvið

Ofta er tað soleiðis, at mytirnar bera ein sannleika við sær, sum tú kanst undrast yvir. Babylonar søgdu um Procyon: Stjørnan við flógvan í Hundinum stóra. Flógvin, vatnið, sum stjørnan lýsti yvir, hevur óivað verið Vetrarbreytin. Annars sæst henda bleiktrandi, gulhvíta stjørnan vestan til á himmalinum í stjørnumyndini: Hundurin lítli.

Eitt arabiskt ævintýr fortelur, at Sirius og Procyon hava verið tvíburðastjørnur, men at Sirius fór frá systir síni og fór og legði seg í stjørnumyndina: Hundurin stóri. Í dag kann vísindin prógvað, at so er. Sirius er farin tvørs av vetrarbreytini í 10.000 ár og vitjað Procyon og er í dag ein partur av stjørnumyndini: Hundurin stóri.

Fólk hava sitið nátt eftir nátt og granskað stjørnuhimmalin og gjørt sínar metingar- latið hetta í skaldskap. Satt at siga er skaldskapurin ofta framman fyri vísindina — nógv dømi er um tað, og undrast kunnu vit, at Babylonar og Arabar langt fyri okkara tíð, hava gjørt sínar metingar um slóðir á himmalhválvinum, sum vit í dag kunnu ávísa eru rættar.

Tú ert her eina skamma stund. Stjørnurnar hava sínar slóðir, sínar aldargomlu søgu, sum vit við okkara djúpu tonkum kunnu grunda yvir. Vit eiga at seta halkoytur í og ansa eftir at týningin ikki bara fer aftur við borðinum, og einki stendur eftir. Tey, sum tóku seg niðan frá við Petur Martini, sóu nú at húsini á Høvdanum eru komin upp aftur at standa oman fyri Bókasavnið. Hetta er ímillum elstu hús í Eysturoynni. Tey hava staðið meira enn hundrað ár Norðuri á Høvda, og uml. 50 ár Vesturi í Húsi. Tey vóru flutt úr Lamba inn til Fuglafjarðar uml. 1835. Tá hava tey staðið nøkur ár á Kinn í Lamba, áðrenn tey komu til Fuglafjarðar. 200 ár eru ikki so nógv, men er hetta millum elstu fornminni í bygdini. Eg kann ikki siga annað enn Fuglafjarðar fornminnisfelag við Petur Martini á odda takk fyri hetta verk, sum her er avrikað.

Leggjast kann afturat um hesi hús, at tey hava verið sum ein gongustjørna — flutt seg úr einum stað í annað. Sirius hevur fingið sína legu og tykist at vera nøgd við rásina, sum hon nú hevur. Vónandi fara Høvdahúsini at festa rót, hvíla og vera eitt gott støði undir mentan okkara og lýsa sum Procyion yvir Vetrarbreytina í mentanarlívinum. Sirius hevur hevur sett síni sporð í rúmdarsøguna og Høvdahúsini hava gjørt sína rás í síni 200 ára søgu og fer við síni slóð at geva okkum uppaftur meira. Tað er okkara vón, at svá er.

Mannavegurin niðan á Skarð hevur sína gøtu og ber boð um, at her hava fólk gingið í fleiri hundrað ár. Tey hava givið steinum, homrum, túvum, heyggjum, dølum, bólum, gilum, tangum, tindum og fjøllum nøvn. Fyri einum ári síðani, tá ið Hellurnar fyltu 150 ár, kom bóklingur út við staðanøvnum her um vegir. Alfred Klein er rithøvundirin og Petur Martin hevur savnað. Hesin bóklingur, sum er ein glampandi stjørna í okkara mentanarverð, er nú farin sína leið til Lærda háskúlan í Oslu og er nú savninum á hesum stað við staðarnøvnum víða um úr Noregi. Hesin lítli bóklingur, henda fitta gongustjørnan hevur týdning, hon er ikki farin av leið, nei hon hevur funnið seg til rættis ímillum tað stjørnuhav av staðanøvnum, sum eru allastaðni, hvar fólk hava búð og búleikað, og tað skulu vit vera fegin um, at henda slóð røkkur líka til Oslu, og ikki minst at hetta er savnað í hesum fitta bóklingi.

Tú kennir fløvan av teimum fólkum, sum vit hava kent, ið gingið hava hesa leið. Mangur, sum var á foldum fyri fimm árum síðani, hvílir nú undir moldum. Eg hugsi um Arnold Øra, sum dagliga hevði sína gongd niðan á Háls og yvir á Góðadal. Góðadalur var heimur hansara, og gjørdist tað tómligt í bispagarðinum við Góðadalsrætt, tá ið hann ikki var meira. Mær untist at ganga á fjall við honum í eini 25 ár og røkta við Arnoldi eini trý fýra ár. Hetta var ikki so nógv, men tann rás, ta slóð, sum hann vísti á, er tinnuglóðir í hugans heimi í umfarinum av stjørnudusti frá farnum døgum.

Gamalt var at seyðurin á Góðadali skuldi hava tað gott um jólini, tí var dúgliga vitja yvir á dalin fyri jól. Upp undir jól 1983 var einki undantak. Arnold var fyrivarin. Farast skuldu varliga avstað. Frost var, og var rásin niður av Hálsi sum á einum kalvabaki. Hóast høgt var dúgliga slapst ikki niður fyri jól. Hetta nívdi Arnold, at hann ikki fekk grivið út úr bólunum, so seyðurin hevði tað gott á jólum. Lat meg siga tað, at seyðamenn høvdu sínar eygleiðingar. Var kavi, men tátt úti undir Eið, kundi sleppast niður av Hálsi, men var frost á Traðargøtu slapst ikki niður.

Arnold helt, at var gott veður triðja jóladag, skuldi vit fara tíðliga avstað. Sum sagt so gjørt. Tað var slíkt findarveður - kavi, klárt og stilt. Dávid kongur hugdi upp eftir fjallasíðuni og undraðist. Mikkjal á Ryggi undraðist eisini.. her lyftist upp vár andi ….. Babylonar og arabar sótu eisini og undraðust, tá ið leitað var upp í hæddirnar, men hesin morgun, triðja jólamorgun 1983 var hvirran eins sum á Bethlehems fløtum, tá ið hirðarnir sóu stjørnuna og fylgdu henni til fjósið í Betlehem. Tú hoyrdi onkran jólamann niðri í bygdini leita upp hús og hvørva í onkrum skoti og syngja : Stjørnulýsi jólanátt….

Komin niðan á Háls, lótu Norðoyggar seg í veikt, purpurlitt morgunljós og morgunstjørnan, Venus damlaði vestan fyri sólarneystið. Hon kann síggjast bæði sum morgunstjørna og kvøldarstjørna. Eftir sólsetur sæst hon standa beint eystan fyri sólina. Hon er bjartasta gongustjørnan og er týggju ferðir bjartari enn Sirius og liggur 47 stig frá sólini.

Hesin morgun er ein tann fagrasti, eg havi livað. Tú ert á einari lítlari gongustjørnu eina skamma stund, men angin av tí ævigu rúmd henda morgun burtur í oyðuni, kendist so nær og tættur, at tú næstan kundi taka í hann. Tann óendaligi meldurin, sum vit bert eru eitt dism av, bar kenslu av tí miklu ferð, ið jørðin hevur. So stórur sum heimurin er, so lítlan kennir tú teg og til seinast ert tú horvin, sum eitt lítið støvkorn í hesum veldugu rúmdarhavi.

Vit komu niður á Góðadal henda morgun, gróvu út úr bólunum og fóru oman í Bispagarðin og fingu okkum ein munn, áðrenn vit tóku okkum niðan á Háls aftur.

Arnold Øre hevur havt sína gongd her. Hann fór ígjøgnum tíðarhavið sum ein gongustjørna. Hann hevur verið her og sett sítt navn í steinar og grýti yviri á Góðadali. Hann var sum víkingurin, ið kom til Konstantinopel, sum ein dag stóð í Soffiu kirkjuni - kanska undir eini guðstænastu og keddi seg fyri 1000 árum síðani og risti navn sítt í marmorið uppi á pulpiturinum í Suffiukirkjuni: Hálvdan. Hesin víkingur var á ferð. Hann sleit seg leysan úr tí tryggu heimbygdini — eins og Sirius. Ikki vildi hann verða heimføðingur, men fór sína longu gonguferð til Istanbul, og boðini vóru : Eg, Hálvdan havi verið her. Hetta er til sjæls enn tann dag í dag. Kanska var hesin víkingur úr Íslandi ella Føroyum. Hvør veit?

Á einum steini omanvert rættina á Góðadali hevur Hans David í Skúlanum – Gamli skúli, ið var lærari her í bygdini, ritað navn sítt í henda stein 9. Mei 1892. Liðin eru meira enn 100 ár síðani hann hetta gjørdi, og óiva eigar hann ikki so fáar steinar í rúgvuni undir varðanum á Skarðinum. Hans David í skúlanum hevur verið her!

Søga okkara er ung — Sirius er aldargomul, mytirnar um tað kosmiska himmalhavið eru gamlar, orð Dávids eru gomul, Húsini á Høvdanum eru gomul í okkara verð, staðarnøvnini eru gomul, Arnold Øre hevði fylt 77 ár í ár, um hann hevði livað, men Petur Martin er ungur enn.

Tað er gott at fara niðanfrá og lata fjallakvirruna og tann kosmiska andan tala til okkara og vísa okkum a hvussu sárbart alt er á hesi gonguferðini í okkara umhvørvi og ta ævigu fer úti millum stjørnur og stjørnudust, men tað sum hevur týdning er, at vit lata ein boðskap eftir okkum, sum sigur: at vit hava verið her.

**Frits**



e-mail: jakup@sosialurin.fo

Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

## Norðurlendskur flogbóltsfundur í Føroyum

*Flogbóltssamband Føroya var um vikuskiftið vertur fyri norðurlendskum leiðarafundi*



*Eftir fundin vórðu norðurlendsku gestirnir bodnir til Kirkjubøar*

***Mynd: sveinur***

Sveinur Tróndarson

Um vikuskiftið var Flogbóltssamband Føroya vertur fyri fundi hjá norðurlendsku flogbóltsleiðarunum. Hesin fundur verður hildin upp á skift í teimum ymsu londunum, og í ár stóðu føroyingar fyri tørni.

Øll tey norðurlendsku flogbóltssambondini uttan tað grønlendska og íslendska høvdu sent umboð til fundin, sum tí var væl mannaður.

Nógv ymisk mál vóru á skránni á fundinum, sum byrjaði fríggjakvøldið og helt fram allan leygardagin. Størsta málið av føroyskum áhuga er norðurlendskur stuðul til uppskotið, sum verður lagt fyri aðalfundin hjá CEV, sum er evropeiska flogbóltssamgongan.

Tað uppskotið gongur út upp á, at CEV veitir fíggjarligan stuðul uppá 50 túsund CHF til hvørt av fyrireikaralondunum, sum átaka sær at skipa fyri C-undankappingini. Tað er tann kappingin, sum fyrr kallaðist smálandakappingin, men sum nú er vorðin ein almenn innleiðandi kapping til kappingina um evropeiska meistaraheitið í flogbólti.

Tað er sera dýrt at skipa fyri slíkum kappingum og tað er torført at fáa fíggjarligan stuðul til allar útreiðslurnar og tí halda londini í C-bólkinum at CEV eigur at lata fyrireikarunum fíggjarligan stuðul.

### Norðurlendskt samstarv

Annað mál á fundinum var gjøgnumgongd av ársfundinum hjá altjóða flogbóltssamgonguni FIVB. Tann fundurin varð hildin í Seville í Spania í døgunum 2. til 4. august í ár, og tá vóru flestu norðurlendsku sambond, harímillum tað føroyska til staðar.

Tað hevur sermerkt norðurlondini, at tey hava havt eitt sera gott sínamillum samstarv í altjóða høpi. Tað hevur stóran týdning fyri londini, at tey halda saman, og tí tey gerast ein sera áhugaverdur partur í tí høga ítróttarpolitiska spælinum, sum m. a. fer fram í gongini, tá fundur er.

Næsta ár skal nýggjur formaður veljast í CEV, og tí varð á fundinum í Havn tosað um, hvussu norðurlond skulu fyrihalda seg í tí spælinum. Niclas Joensen, formaður í Flogbóltssambandi Føroya, sigur við Sosialin, at eingin norðurlendingur verður uppstillaður til formansstarvi, men kortini er tað ein áhugaverdur spurningur, hvørjum norðurlondini »halda við«. Núverandi formaðurin í CEV er týskari og eitur Rolf Andressen.

Norðurlond hava annars umboðan í bæði CEV, FIVB og í undirnevndum hjá báðum samgongunum. Finnin Santallainen situr í FIVB nevndini meðan Lasse Svensson, sum er sera áhugaður í føroyskum viðurskiftum, situr í CEV. Har situr eisini ein dani, sum eitur Max Kjær. Hann situr í dómaranevndini hjá evropeiska felagnum.

### Opnar NM-kappingar

Niclas Joensen greiðir frá, at tey eisini tosaðu um, hvussu NM-kappingarnar í flogbólti skulu skipast framyvir.

Higartil dags hava bert norðurlond havt atgongd til kappingina, men tað er ikki óhugsandi at tað verður ein farin tíð, áðrenn langt um líður, sigur Niclas Joensen.

- Ein møguleiki er at gera NM til opnar kappingar. Her er ein møguleiki at hava átta lið við. Tá fáa norðurlond fyrst møguleika at tekna til, og eftir tað verður so fylt upp til átta við serliga innbodnum londum, greiðir Niclas frá.

Hesin háttur at skipa fyri »opnum« NM-kappingum upp á er ikki føroyingum ókendur. Fyri stuttum var kappaðust U-16 liðini í fótbólti um júst eitt slíkt opið NM, saman við Onglandi og Skotlandi.

### Flogbóltslýsingar síggjast betri

Eitt av teimum minnu, men fyri flogbóltsfyrireikarar sera áhugaverdu evnunum, var finska framløgan av eini kanning av lýsingarvirðinum til ymsar ítróttir.

Finnar hava kannað, hvussu væl lýsingarnar kring vøllin síggjast meðan dysturin gongur, og har hava teir funnið fram til, at onkrar lýsingar síggjast í 70 prosent av senditíðini, tá lýst verður í flogbólti.

- Hetta er ein sera áhugaverd kanning, sigur Niclas Joensen, sum sigur, at hetta er eitt gott amboð at brúka í sambandi við landsdystir og í sambandi við steypakappingar.

Tá fundurin var liðugur fór ferðalagið við FBF á odda til Kirkjubøar, har føroyingarnir vóru vertir við ein døgverða. Fleiri av útlendsku gestunum høvdu verið í Kirkjubø áður, men tey spurdu um tey ikki kundu sleppa hagar einaferð afturar.

Norðurlendsku gestirnir fóru av aftur landinum sunnudagin.

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum: www.sosialurin.fo

## Føroyameistari skal finnast

*Hóast kappróðurin so at siga er av á hesum sinni, verður framvegis siglt við seglum*

Jákup Mørk

Seinasta kappsiglingin í ár verður leygardagin 27. august, tá stóra kappsiglingin hjá Lions Club í Eysturoynni er á skránni.

Undan hesari hava bátarnir kappast á eystanstevnu í Runavík, á sundalagsstevnu í Kollafirði, á Strandastevnu og á Hvítanesi. Alt eftir, hvussu ymsu bátarnir hava staðið seg, hava teir fingið stig í hvørjari kapping, og eftir seinastu siglingina, verður so føroyamiestarin kosin.

Til samans hava 32 bátar tikið lut í kappingunum, og verður støðan undan seinastu siglingini prentað niðanfyri.

| Bátur | Heimstaður | stig |
|---|---|---|
| Hoyvíksbáturin | Hoyvík | 69 |
| Leivur | Kollafjørður | 63 |
| Búgvin | Toftir | 57 |
| Thyra | Strendur | 54 |
| Gjáarbáturin | Kollafjørður | 54 |
| Sníkur | Kollafjørður | 51 |
| Koltursbáturin | Kollafjørður | 47 |
| Mia | Glyvrar | 42 |
| Helga | Kaldbak | 40 |
| Vinur | Tórshavn | 40 |
| Ternan | Hósvík | 35 |
| Sigmundur Br. | Tórshavn | 34 |
| Lítlibátur | Hósvík | 32 |
| Svanur | Skála | 32 |
| Falkurin | Strendur | 31 |
| Birgishamar | Kollafjørður | 26 |
| Dúgvan | Glyvrar | 26 |
| Niels í Nesinum | Tórshavn | 21 |
| Olivia | Kollafjørður | 21 |
| Miðgerð | Kollafjørður | 21 |
| Guðrið | Saltangará | 20 |
| Thorshavn | Argir | 17 |
| Lítli Lundi | Skála | 16 |
| Conny | Saltangará | 14 |
| Sildin | Hoyvík | 13 |
| Sørin | Kollafjørður | 10 |
| Góðadalsbáturin | Saltangará | 9 |
| Rakul | Toftir | 7 |
| Heykur | Kolbanargjógv | 2 |
| Æðan | Norðskáli | 1 |
| Elisa | Strendur | 0 |
| Havgásin | Hósvík | 0 |